# ÍTRÓTTUR

SAMBAND
JÁKUP MØRK
JAKUP@SOSIALURIN.FO
TLF. 341800

## Átta rógvarar úr Knørri til DM

**15. september fara átta rógvarar úr Róðrarfelagnum Knørri á Skálatrøð at rógva DM fyri innriggarar**

KAPPRÓÐUR
*Teitur Joensen*
*teitur@sosialurin.fo*

Róðrarfelagið Knørrur hevur sum nýtt átak boðið rógvarum sínum at luttaka í DM fyri innriggarar, og áhugin fyri tiltakinum hevur verið rættiliga stórur. Í fyrsta umfari er ætlanin at vita, hvussu kappingin er, og síðan verður støða tikin til, um hetta skal gerast afturvendandi tiltak hjá róðrarfelagnum á Skálatrøð.

Rógvararnir eru væl fyri kropsliga, men skulu læra seg teknikkin at rógva í fremmandu bátunum. Fyri hesum stendur ein av fyrrverandi rógvarunum í felagnum, Katrin Rubek Nielsen, sum eisini hevur róð í slíkum báti í Danmark.

Úttiknu rógvararnir eru Paula Eikhólm, Eivy Olsen og Bára Berghamar Danielsen, sum síggjast á myndini, og sum fara at umboða kvinnurnar, og fyri menninar fara at rógva Jens Michal Tróndheim, Johan Jacobsen, Jacob Joensen, Helgi Øster Petersen og Høgni í Skorðastovu.

# B36 nú aftur á odda

**B36 er nú einsamalt á odda í 1. deild hjá kvinnum, eftir at tær vunnu torføran útidyst um vikuskiftið. KÍ hevur tó leikt ein dyst færri, og vinna tær tann dystin, so er aftur púra javnt**

FÓTBÓLTUR
*Teitur Joensen*
*teitur@sosialurin.fo*



*B36 vann um vikuskiftið torføra útidystin ímóti GÍ í bestu kvinnudeildini, og tí verður helst lagt upp til dyst um meistaraheitið, tá KÍ tekur ímóti B36 tann 8. september*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

Tríggir dystir í bestu kvinnudeildini í føroyskum fótbólti skuldu vera á skránni um vikuskiftið. Men tá alt kom til stykkis, so vóru bert tveir dystir spældir, tí at NSÍ, sum skuldi spæla ímóti KÍ í Klaksvík, eftir øllum at døma hevur tikið liðið úr kappingini.

Tískil bleiv ein dystur spældur í Gøtu, har B36 var á vitjan, meðan seinni dysturin var á Argjum, har AB tók ímóti EB/Streymi.

### B36 vann torføran útidyst

Í hesum kappingarárinum hava tað verið B36 og KÍ, sum hava kappast um fremsta plássið í bestu kvinnudeildini, og sum stigatalvan sá út undan dystunum um vikuskiftið, so lógu hesi bæði liðini eisini jøvn á fremsta plássi við 34 stigum.

Av tí at dysturin hjá KÍ var av ongum um vikuskiftið, so hevði B36 møguleika at leggja trýst á KÍ, um tær vunnu torføra útidystin ímóti liðnum á 3. plássi, GÍ.

GÍ legði seg langt aftur á vøllin frá byrjan av, og tað var B36, sum alla tíðina royndi at trýsta. Hetta gekst ikki so væl, men um miðjan fyrra hálvleik fingu tær allíkavæl lagt seg á odda. Eitt hornaspark bleiv sent inn í brotsteigin, og har fekk Unn Kragesten fótin á ein leysan bólt, sum endaði í málinum, og so var 1-0.

Eftir steðgin var tað enn B36, sum sat á dystinum, tó uttan at skapa teir heilt stóru málmøguleikarnar. 10 minuttir fyri leiklok bragdaði tó hjá gestunum, tá tær spældu væl upp í gjøgnum vinstru síðu. Brádliga gjørdist Heidi Sevdal púra leys, og einsamøll við málmanninum sveik hon ikki, og so var 2-0, sum eisini gjørdist endaliga úrslitið.

### Málleysur javnleikur á Argjum

Seinni dysturin um vikuskiftið var á Argjum, har AB á 5. plássi tók ímóti EB/Streymi, sum liggur nummar fýra.

Undan steðginum royndi EB/Streymur at trýsta, og tær komu eisini fram til onkrar smávegis málmøguleika, sum tó ikki endaði við málið. Miðskeiðis í hálvleikinum bleiv Rakul Magnussen hjá EB/Streymi brádliga púra leys, men hon rakti mitt á málmannin, og so stóð enn á jøvnum.

Í seinna hálvleiki vóru rollurnar umbýttar. Nú var tað AB, sum royndi at trýsta EB/Streym, meðan EB/Streymur royndi seg við mótálopum. Hetta gav eisini ávísar møguleikar, men tann størsta fekk AB, tá ein av teirra leikarum gjørdist púra leys. Mildrið Djurhuus í málinum hjá EB/Streymi fekk tó bjarga bóltin á stongina, áðrenn hann bleiv skotin vekk.

Eftir hetta vóru ikki teir stóru kjansirnir, og tí endaði dysturin við málleysum javnleiki.

Við hesum úrslitunum er B36 nú einsamalt á odda, men KÍ hevur tó ein dyst í hondini. Vinna tær henda, so er líkt til, at meistaraheitið skal avgerast tann 8. september, tá KÍ tekur ímóti B36.

# Tvey føroysk met í Gent

**Tveir føroyskir ÍSB-svimjarar luttaka í hesum døgum í heimsmeistarakapping í Gent í Belgia, og í gjár setti annar teirra tvey nýggj føroysk met**

SVIMJING
*Teitur Joensen*
*teitur@sosialurin.fo*

Heimsmeistarakapping í svimjing fyri rørslutarnað verður í hesum døgum hildið í belgiska býnum Gent. Tað er felagsskapurin INAS-SID, sum stendur handan hesa kapping, og stórur partur av heimsins londum eru umboðaði. Eisini føroyingar eru umboðaðir í kappingini. Tað eru tey bæði Ragnvaldur Jensen og Apolonia Justesen, sum eru við í kappingini, og fyrsti kappingardagurin hjá svimjarunum var á skránni í gjár, tá Ragnvaldur tók lut í tveimum kappingum, meðan Apolonia tók lut í einari.

### Tvey nýggj met

Hjá Ragnvaldi gekk avbera væl á fyrsta degnum. Fyrst tók hann lut í kappingini í 100 m ryggsvimjing, og her setti hann nýtt føroyskt met í innleiðandi umfarinum. Ragnvaldur kom á mál í tíðini 1:20.43, og hetta er nýtt føroyskt met. Sjálvt um hann setti nýtt føroyskt met, so rakk tíðin ikki til eitt pláss í finaluni hesu ferð.

Løtu seinni skuldi Ragnvaldur aftur í hylin at svimja 50 m bringu svimjing, og í innleiðandi umfarinum kom hann á mál við tíðini 37.62 sekund, og hetta gav honum eitt pláss í finaluni.

Í finaluni tók Ragnvaldur eitt heilt sekund av innleiðandi tíðini, tá hann kom á mál við tíðini 36.61 sekund. Hetta var eisini nýtt føroyskt met, men allíkavæl rakk hetta bert til eitt áttanda pláss. Kappingin var tó ógvuliga hørð, og munurin upp til svimjaran á fjórða plássi var bert eitt hálvt sekund.

Apolonia skuldi eisini taka lut í einari kapping henda dagin. Hon kappaðist í 50 m frísvimjing, og kom hon á mál í tíðini 36.44 sekund. Hetta var ikki hennara besta tíð á teininum, og tíðin rakk heldur ikki til eitt pláss í finaluni.

Annars verður sagt úr Belgia, at tey hava tað gott, og seinni í dag skulu svimjararnir kappast í tveimum kappingum hvør. Ragnvaldur skal taka lut í 50 m fírvaldsvimjing og 200 m blandað svimjing, meðan Apolonia skal svimja 100 m frísvimjing og 200 m bringusvimjing.

Heimsmeistarakappingin verður líka til fríggjadagin, og svimjararnir koma heima til Føroya sunnudagin.



*Apolonia Justesen, sum sæst á myndini, og Ragnvaldur Jensen taka í hesum døgum lut í heimsmeistarakapping í svimjing í belgiska býnum, Gent*

*Mynd: Álvur Haraldsen*